## Valevni løgd fram í Runavík



Runavíkar kommuna ger vart við, at vallistin til kommunuvalið 11. november fyri valdømið í Runavíkar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Saltangará í døgunum frá 14. oktober til 28. oktober í vanligari skrivstovutíð. Kommunan ger vart við, at kæra um at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 4. november.

## Freistir í samband við býráðsval

Innlendismálaráðið hevur sent kommununum skriv við leiðreglum til býr áðsvaliðInnihaldBýráðsval verður 11. november og í hesum sambandi eru fleiri praktisk ting hjá borgarum at hava greiðu á. Klaksvíkar kommuna vísir á, at til ber at venda sær til kommununa og fáa at yvirlitið yvir hesar freistir at vita. Til dømis viðvíkjandi brævaatkvøðum, kunngerð av vallistum og annað.

# Undirvísing altíð havt mín áhuga

**- Líka síðani eg undirvísti á Handilsskúlanum mitt í 80-unum hevur undirvísing havt mín áhuga, og míni 16 ár sum landsgrannskoðari geva mær eina ávísa vitan á økinum, sigur nýggi aðalstjórin í Mentamálaráðnum, Leivur Harryson**

UMSITING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Um miðan komandi mánaða fer Leivur Harryson niðan í Mentamálaráðið og starvið sum aðalstjóri har*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mentamálaráðið umsitur eina breiða viftu av málsøkjum, men hetta er kortini ikki nakar trupulleiki fyri nýggja aðalstjóran, Leiv Harryson.

- Gjøgnum 16 ára royndir sum landsgrannskoðari kenni eg sjálvandi øll aðalráðini, eisini Mentamálaráðið, sigur Leivur Harryson.

Hann hevur eisini starvast sum lærari og inspektørur á Handilsskúlanum, og tað hevur givið eyka barlast á undirvísingarøkinum.

Tað er ikki enn sett dato á, nær Leivur Harryson byrjar sítt starv í Mentamálaráðnum, men tað verður ur einaferð mitt í komandi mánaði.

- Eg havi nakrar uppgávur her, sum eg má fáa frá hondini, áðrenn eg kann taka við sum aðalstjóri, sigur Leivur Harryson.

Hann starvast í løtuni sum deildarleiðari á Tryggingar-, Fjarskiftis-, Elveitingar- og Posteftirlitinum.

### FAKTA

Leivur Harryson er 53 ára gamal og útbúgvin cand.merc í grannskoðan frá Handiklsskúlanum í Keypmannahavn.

Eftir lokna útbúgving í 1982 starvaðist hann sum grannskoðari hjá Ragborg & Gaard í Keypmannahavn.

Frá 1983 til '86 var hann lærari og inspektørur á Føroya Handilsskúla, og frá 86 til 91 sum grannskoðari hjá Deloitte í Skovlunde.

Frá 1/11 1991 fram til 31/12 2007 starvaðist hann sum landsgrannskoðari og frá ¼ 2008 sum deildarleiðari á Tryggingar-, Fjarskiftis-, Elveitingar- og Posteftirlitinum.

### Hugsaði ikki um trupulleikar

Tað er eingin loyna, at tað hava verið ávísir trupulleikar í Mentamálaráðnum, og skift er eitt sindur runt við fólki. Men tað hevur ikki ligið frammarliga í tonkunum hjá Leivi Harryson.

- Satt at siga, so hugsaði eg als ikki um trupulleikar, tá eg søkti starvið, sigur Leivur Harryson.

Hann sigur, at enn er ov tíðliga at koma inn á, hvat hann fyrst fer í holt við, tá hann hevur tikið við sum aðalstjóri.

- Eg havi ikki enn tosað við nakran í Mentamálaráðnum, heldur ikki landsstýriskvinnuna, so eg fari at bíða við at siga nakað um, hvat eg taki hond í fyrst, sigur Leivur Harryson.

Hann ætlar sær tí í fyrstu syftu at halda kortini tætt at kroppinum, tí tað er ikki taktiskt rætt at melda nakað út, longu áðrenn hann hevur tikið við sum aðalstjóri í Mentamálaráðnum.

# Enn ein miðbýarhandil letur aftur

**Harradeildin í Handilskjarnanum letur nú aftur, og við honum gevst eisini fjórða triðja ættarlið at selja mannfólkaklæði á júst hesum blettinum í Havn**

HANDILSLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*





*Tað er við sorgblídni, at Sámal Joensen nú gevst at selja klæði í Niels Finsens gøtu. Langabbin, Hans Joensen, lat fyrsta handilin við mannfólkaklæðum upp á sama stað í 1889*

Nú avgjørt er at lata harradeildina í Handilskjarnanum aftur, er tað fyrstu ferð í meiri enn hundrað ár, at mannfólk ikki kunnu ekvipera seg í Niels Finsens gøtu í Havn.

So tað er við sorgblídni, at leiðarin, Sámal Joensen, nú gevst við at selja mannfólkaklæði. Sámal Joensen er langabbasonur gamla Hans Joensen, sum lat upp handil við mannfólkaklæðum á hesum stað í 1889. Her hava bæði abbin, Rudolf Joensen, og farbróðurin, Hans Joensen, rikið virksemið víðari, inntil flutt varð niðan á Háls. Men Sámal, sum hevur lært til seljara av mannfólkaklæðum, hevur verið leiðari av harradeildini til hendan dag.

### Fólk detta ikki inn á gólvið

Harradeildin í Handilskjarnanum er triði av upprunaligu fýra handlum í handilshúsinum við rullutrappuni. Seinasta árið hava bert tveir handlar verið í húsinum; umframt harradeildina, eisini Deres, sum heldur fram á veghæddini.

Sámal Joesen sigur við Sosialin, at tá tey valdu at lata damu- og barnadeildina aftur fyri knøppum ári síðani, var vónin, at Harradeildin fór at klára seg eins væl og higartil.

- Men tað hevur smittað av uppá okkum, at konufólkini ikki eru dagligir gestir í húsinum longur. Sum heild er tað torført at fáa fólk at koma upp í hæddirnar, og mannfólkini detta ikki bara inn á gólvið, sigur hann.

### Færri pengar og parkeringspláss

Sámal Joensen heldur eisini, at býráðið eigur ein part av ábyrgdini fyri, at handilin ikki ber seg longur.

- Tá býráðið velur at taka parkeringsplássini burtur frammanfyri, velja fólk heldur at fara onkra aðrastaðni, tí føroyingar vilja koyra til dyrnar. Heldur ikki er tað nóg mikið at sleppa at parkera í eitt korter, tí man keypir ikki mannfólkaklæði so skjótt, sigur Sámal Joensen. Hann hevur eisini varnast, at fólk sum heilt hava minni av peningi millum hendurnar.

- Innanfyri detailhandilin er tað týðuligt, at fólk heldur vilja keypa bíligaru merkini. So teir handlarnir fara helst at hóra undan, roknar hann við.

Síðsta starvsfólkið fór frá tann 1. september, og Sámal Joensen, hevur fingið nýtt starv sum sølumaður hjá Kemilux tann 1. november. Hølini verða helst leigað út til skrivstovu ella líknandi og onkur hevur longu víst áhuga. Hølini skulu vera klár til yvirtøku 1. januar. Mikumorgunin verður útsøla í harradeildini í Handilskjarnanum.